# Deyður hvalur rikin á Sandin

*Sunnumorgunin vaknaðu sørvingar við at síggja ein deyðan hval á Sandinum. Hvalurin er einar 15 metrar langur og vaktarskipið Gorm skal sleipa hann út á hav, tá ið veðrið blíðkar aftur*

ÓLAVUR Í BEITI

Hann liggur langur og hvítur á Sandinum í Sørvági, og henda var sjónin sunnumorgunin, tá ið sørvingar vaknaðu. Tað er ikki lætt at síggja, hvat hetta er fyri ein hvalur, um tað er ein finnhvalur ella bláhvalur, men hann verður mettur at vera einar 12-15 metrar langur.

Tá ið Sosialurin ringdi til vakthavandi á Vaktartænastuni vóru boðini um hvalin longu komin. Men sum veðurtíðindini eru nú, verður helst einki gjørt við at fáa hvalin av aftur Sandinum teir fyrstu dagarnar.

»Tjaldrið« er á sleipistøð, so tað verður vaktarskipið »Gorm« sum skal sleipa hvalin út á hav. Vakthavandi á Vaktartænastuni metir, at hvalurin má sleipast einar 15 fjórðingar úr landi, so hann ikki rekur inn aftur.



*Hvalurin er so illa farin. at ilt er at siga hvat hetta er fyri eitt skepilsi, sum sørvingar hava fingið á vitjan um túsundáraskiftið*
**Mynd: Andrass Henriksen**

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, sum skjótt veksur upp í hvassan vind av suðri og landsynningi. Skýggjað og eftir miðdag nakað av regni. Út á dagin støkkur hann vesturum til útsynning og vestan og veksur upp í skrið ella storm. Hann klárar í við ælaveðri. Um náttina hækkar hann upp í útnyrðing og minkar vindin. Hitin millum 3 og 5 stig.




**Mikudagin:**
At byrja við lot til andøvsgul av ymsum ættum, men rættiliga skjótt vaksandi til strúk í vindi til skrið av suðri og landsynningi við regni. Móti kvøldi støkkur hann vesturum til útsynning og minkar vindin nakað, men framvegis nakað av regni. Hitin upp í eini 7 stig.




**Hósdagin:**
Hvassur vindur av útsynningi, sum út á dagin hækkar upp í útnyrðing, at byrja við regn og hitin um eini 7 stig, men hitin fellur og hann klárar nakað í, tó framvegis ælaveður. Um náttina minkandi vindur av vestri og okkurt vátaslettings- ella kavaæli. Hitin beint omanvert frostmarkið.

**Fríggjadagin og leygardagin:**
Upp í hvassan vind av suðri og landsynningi, sum seinni støkkur vesturum til útsynning við regni. Tað verður lýggjari, umleið 5 stig.




Eitt stormlágtrýst yvir Føroyum hvørvur í ein landnyrðing. Eitt lágtrýst yvir Atlantshavinum í ein landsynning úr Hvarvinum uml. 56N/35W, fer í ein landnyrðing og dýpist og fer beint norðan fyri Føroyar í dag og hevur vind og regn við sær.




Eitt nýtt lágtrýst nærkast spakuliga av útsynningi og brúgvaløg haðani við vindi og regni snara inn yvir oyggjarnar. Seinni í vikuni nærkast enn eitt lágtrýst av útsynningi.




**Hitalagið mált frá 02./01. kl 06⁰⁰–03./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,1°C**
Minsti hiti máldur í jan.: **÷8,8°** Mesti hiti máldur í jan.: **11,6°**




Avfallið: 12,0 mm – **mált frá 02./01. kl 6⁰⁰–03./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 23,0 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷14 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 4 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannahavn | 2 |
| Helsinki | ÷6 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷1 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 17 |
| Malta | – |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 14 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 1 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 14 |
| Panama | – |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

## Vestfalskyrrindi

3. januar: Jørðin næst sólini
4. januar: Mánin longst frá jørðini
6. januar: Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. jan. | 0439 | 1651 | 0339 | 1551 | 0354 | 1606 | 0639 | 1851 | 0739 | 1951 | 0254 | 1506 | 0154 | 1406 | 0454 | 1706 | 0554 | 1806 | 0424 | 1636 | 0539 | 1751 |
| 5. jan. | 0521 | 1741 | 0421 | 1641 | 0436 | 1656 | 0721 | 1941 | 0821 | 2041 | 0336 | 1556 | 0236 | 1456 | 0536 | 1756 | 0636 | 1856 | 0506 | 1726 | 0621 | 1841 |
| 6. jan. | 0600 | 1819 | 0500 | 1719 | 0515 | 1734 | 0800 | 2019 | 0900 | 2119 | 0415 | 1634 | 0315 | 1534 | 0615 | 1834 | 0715 | 1934 | 0545 | 1804 | 0700 | 1919 |
| 7. jan. | 0639 | 1858 | 0539 | 1758 | 0554 | 1813 | 0839 | 2058 | 0939 | 2158 | 0454 | 1713 | 0354 | 1613 | 0654 | 1913 | 0754 | 2013 | 0624 | 1843 | 0739 | 1958 |








